# Brandur skal eisini til Nibe

**Brandur Enni er nú eisini biðin um at koma at spæla á stóra pallinum á Nibe Festivalinum, har nógv kend nøvn skulu spæla**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Brandur Enni hevur rættiliga fangað áhuga hjá donsku festivalumboðnum, sum vóru í Føroyum í sambandi við Prix Føroyar finaluna. Nú hava bæði festivalarnir í Jelling og Nibe biðið unga poppsangaran koma at syngja hjá teimum. Síðst í mai mánaði spælir Brandur á høvuðspallinum Jelling, og nú hevur hann eisini fingið boð um at koma til festivalin í Nibe, har hann somuleiðis skal spæla á stóra pallin millum høvuðsnøvnini.

Brandur skal syngja fríggjadagin tann 27. juni beint áðrenn dreingjabólkurin C21 fer á pallin. Á sama palli spæla eisini nøvn sum Kim Larsen og Zididada seinni á degnum.

Prix-vinnararnir Gestir skulu eisini spæla í Nibe. Teir spæla í Mánalýsisteltinum fríggjakvøldið 27. juni kl. 21.45.



## Tøkk

Vit takka øllum tykkum, sum vístu okkum samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Gunhild Rasmussen**
**í Sandavági**

doyði og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til tykkum øll á Ellis- & Avlamisheiminum í Vágum, sum ansaðu og vóru um hana á tykkara serliga vinarliga og kerliga máta. Tit gera eitt sera gott arbeiði.

Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini, tøkk til sangarar, organist, klokkara og prest.

Takk fyri kransar, blómur og peningagávu til kirkjuna.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

**Kamma, Erwin og Erland við familju**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróðir okkara

**Petur H. Davidsen**
**Haldórsvík**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk øll, ið hjálptu til við ervinum og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Georg**




Bilpakkar Summarsiglingin 2003

Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

Tórshavn - Bergen ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

Tórshavn - Lerwick ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




# Brennievni restina av vikuni

**Postverkið og Bygdaleiðir eiga brennievni hesa vikuna út. Ì Norðoyggjum eru bussarnir settir**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*



*Postbilarnir koyra hesa vikuna afturat. So steðga eisini teir*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Verkfallið ávirkar tey flestu í Føroyum, og so við og við eru árinini bara voksin.

Bensini er farið at ganga undan hjá fleiri, men hetta merkist bert partvíst. Serliga eldri diesel bilar klára seg við olju upprunaliga ætlað øðrum endamálum, og teir fáa koyrt leingi.

Tá vit koyrdu ein túr runt í Havnargøtum týsdagin sást ikki so øgiliga nógv til, at verkfall er í løtuni. Allastaðni var stúgvandi fult av bilum. Søgur ganga um, at tað eru fleiri, sum aftur hava funnið súkkluna fram. Jú, tað vóru nakrar súkklur her og har, og onkur hevur eisini keypt sær eina súkklu orsakað av verkfallinum, men nakað súkkluland eru Føroyar ikki vorðnar enn. Í øllum førum var ikki nógv at síggja í Havn, sum fekk teg at hugsa um ríkisfelagin og teirra súkklulívsstíl.

Parkeringsøkið á Skálatrøð var stúgvandi fult av bilum. Í miðbýnum í Havn vóru kanska nakað færri bilar.

Og summi megna at sleppa uttan um verkfalsvaktirnar, soleiðis at vøra aftur kemur í nakrar handlar og onnur støð.

## Restina av vikuni

Bilarnir hjá Postverki Føroya krevja sum allir aðrir brennievni, og hetta fer at merkjast. Bergur í Garði, stjóri fyri Postverk Føroya, sigur, at bilarnir hjá teimum hava brennievni til hesa vikuna, men so fer tað at knípa.

– Tað steðgar spakuliga upp hjá okkum. Vit hava brennievni til tær stóru ruturnar til restina av vikuni, sigur Bergur í Garði.

Sum tað eisini sæst aðrastaðni í blaðnum, so verður postur blokeraður á flogvøllinum, og hetta kann eisini fáa fylgjur uttanlands.

– Vit eiga ikki postin fyrr hann er komin trygt til okkara. Tað er Post Danmark, ið sendir okkum postin. Í sambandi við postflutning skal ein triðji persónur ikki koma ímillum, og Post Danmark fylgir eisini væl við, hvør støðan er í Føroyum, sigur Bergur í Garði.

Kann eingin postur koma av flogvøllinum, so er tað bert innanlandsposturin, sum postboðini fáa borðið út. Men tað verða mestur bert tey við prutlum, sum fara at bera út, tí frá komandi viku hava bilarnir einki brennevni eftir, sigur Bergur í Garði, og tá verður mest sannlíkt ógvuliga lítið av posti at bera út.

## Steðgað í Norðoyggjum

Hjá Strandferðslan er støðan eisini merkt av verkfallinum. Skipini eru undantikin verkfallinum og sleppa at fáa olju.

Bussarnir eru hinvegin ikki undantiknir. Pól Jákup Thomsen, ferðafólkaleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at støðan er eitt sindur ymisk við bussunum hjá teimum.

– Vit hava sáttmála við ymsar arbeiðstakarar kring landið, og tað er eitt sindur ymiskt, hvussu leingi teir hava brennievni eftir, sigur Pól Jákup Thomsen.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at skipini sleppa at sigla, men bert við ferðafólki. Einki undantak verður latin bussunum.

Í Norðoyggjum eru bussarnir hjá bygdaleiðum givnir at koyra, tí einki brennievni er eftir, sigur Pól Jákup Thomsen. Og til verkfallið er liðugt, so broytist henda støðan væntandi ikki.

Annars koyra bussar sum vant, og tað verður í øllum førum hesa vikuna afturat, sigur Pól Jákup Thomsen.

Onkrar leiðir, eitt nú leið 400, hevur minkað um túratalið. Hinvegin koyrir tað væl umtókta flogrutan sum vant.

Tá skúlarnir eru stongdir og fleiri fólk ikki fara til arbeiðis, so merkir hetta eisini færri ferðafólk við bussunum. Tey, sum koma afturat vegna vantandi brennievni til bilarnar, fylla í besta føri tómrúmi av skúlabørnum og øðrum umborð á bussunum.

# Klaga aftur um semingsmann

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli hava ikki álit á varasemingsmanninum, og tey hava sent kæru fyri aðru ferð vil Vinnumálaráðið**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*



*Mynd: Arbeiðarafeløgini í verkfalli hava ikki álit á Suna Schwartz Jacobsen, t.v., og fyri aðru senda tey eina kæru til Vinnumálaráðið. Feløgini vilja nú bert samráðast við Høgna Høgnesen*

Rokið um semingsmannin Suna Schwartz Jacobsen er ikki liðugt enn. Arbeiðarafeløgini vóru so ónøgd við hansara leiklut og støðu, at tey valdu at senda Vinnumálaráðnum eina kæru.

Areiðarafeløgini fingu svar frá Vinnumálaráðnum, har sagt varð, at Vinnumálaráðið ikki kundi viðgera kæruna.

Sagt varð, at uppgávan hjá landsstýrismanninum var at skipa fyri, at ein nevnd við fimtan limum verður vald, sum síðani útnevnir semingsmenn.

Hendan nevnd var samd um at velja Suni Schwartz Jacobsen til varasemingsmann, verður upplýst í skrivi frá Vinnumála-ráðnum til Føroya Arbeiðarafelag.

## Einaferð enn

Men málið steðgar ikki her. Arbeiðarafeløgini í verkfalli hava fyri aðru ferð sent Vinnumálaráðnum eitt skriv, har kært verður um Suna Schwartz Jacobsen.

Kæran snýr seg aftur hesa ferð um leiklutin hjá Suna Schwartz Jacobsen sum grannskoðari og semingsmann fyri somu virki. Hildið verður, at Vinnumálaráðið fer ov lætt um kæruna.

»Vinnumálaráðið skal tí eisini síggja til, at semingsmenninir ikki bróta grundleggjandi reglurnar í fyrisitingarlógini um ógegni.

Vit vænta at tit eru samd við okkum í, at fyrisitingarlógin er galdandi fyri alt alment virksemi, og herundir eisini fyri virksemi hjá semingsmanninum og varamanni hansara.

Vit skulu tí enn einaferð heita á Vinnumálaráðið at taka upp kæru okkara, soleiðis at kæran verður viðgjørd við støðu í ásetingunum í fyrisitingarlógini.

Vit fara ikki at góðtaka, at Vinnumálaráðið ikki vil viðgera eitt mál um ógegni innan eitt av máløkjum tykkara, og tí umhugsa vit at fara víðari við málinum um ikki vit hava frætt aftur áðrenn hósdagin 22.05.2003, siga tey fimm arbeiðarafeløgini í skrivi til Vinnumálaráðið.«

Sjálvur høvuðspersónurin, Suni Schwartz Jacobsen, hevur onga viðmerking til málið yvirhøvur. Hann vil stutt og greitt einki siga um støðuna.

## Ikki vara

Arbeiðarafeløgini hava eisini sent eitt skriv til Semingsstovnin, har feløgini gera greitt, at semingsstovnurin hevur ein semingsmann og ein vara semingsmann. Og arbeiðarafeløgini vilja halda seg til semingsmannin, Høgna Høgnesen.

»Við atliti til støðuna sum nú er íkomin, har undirritaðu feløg hava víst á okkara ónøgd við framferðina hjá varasemingsmanninum og at hann er ógegnigur, halda vit tað er rætt av tygum sum semingsmanni at skipa soleiðis fyri, at møguligur nýggjar semingsroyndir fara fram við støði í lógarorðingini, soleiðis at tað er semingsmaðurin (og ikki varasemingsmaðurin), sum stendur fyri semingsroyndunum«, skriva arbeiðarafeløgini til Semingsstovnin.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tey heilt einfalt ikki hava álit á varasemingsmanninum, Suna Schwartz Jacbosen.

– Tað er ringt at samráðast við einum manni, sum tú ikki hevur álit á, sigur Ingeborg Vinther.

## Eingin kontakt

Tá vit tosaðu við Ingeborg Vinther mikumorgunin segði hon, at púra eingin kontakt var millum arbeiðarafeløgini og semingsmenninar ella arbeiðsgevararnar.

Feløgini skrivað dúgliga um hvørt annað á heimasíðum, men meira enn tað hendir eftir øllum at døma ikki í løtuni.

Eingin nýggjur fundur ella nakað var avtalað, tá vit tosaðu við verkfalsleiðararnar mikumorgunin.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Høgna Høgnesen, semingsmanni.